**Visiónsfundur á Brekku, mánakvøldi 21. september, kl. 19 um útbúgving og frálæru í Lívdini**

Henda lýsing er ætlað øllum í Lívdini, sum fáast við útbúgving / frálæru (til vaksin) - í breiðum týdningi – ella sum hava lutað ætlanir og dreymar, sum hava við útbúgving og frálæru at gera.

Í Lívdini eru á leið 50 ymsar virknar tænastur (onkur er tó ikki heilt byrjað enn).

Fyri at gera visiónstilgongdina so greiða og skipaða sum gjørligt, samstundis sum tað er umráðandi at ØLL samkoman verður hoyrd, eru allar hesar tænastur býttar sundur í 8 bólkar, har hesir 8 bólkar, byrjandi frá næstsíðsta mánakvøldi, eftir tørni verða bjóðaðir á visiónsfund fyri síni virkisøki í samkomuni, 6 tey komandi mánakvøldini.

Komandi mánakvøld kl. 19 er ætlanin, at hava eitt visiónskvøld fyri øll, sum fáast við útbúgving í breiðum týdningi, t.v.s.:

1. Læra/tala á møtum og tiltøkum
2. Skeiðvirksemi
3. Bíbliuskúli
4. Alfa skeið
5. Kjak forum
6. Tiltøk í og út frá Lívdini
7. ...

Øll sum varða av ella eru við í tænastunum omanfyri, verða hervið boðin við til visiónsfundin um útbúgving í Lívdini **mánakvøldi 21. september 2009, kl. 19 á Brekku**. Somuleiðis øll, sum hava áhuga fyri hesum evni!

Grundstøði fyri visiónsfundinum mánakvøldi verður hjálagda skjali "*Karmar fyri visjónirnar í Lívdini*", sum er ein kladda gjørd av leiðsluni.

Komið við, og latið allar tykkara stórstu dreymar í sambandi við útbúgving / frálæru í Lívdini ljóða komandi mánakvøld kl. 19 á Brekku.

Vegna praktiska fyrireikingarbólkin

Jens Wang"